www.oljan.fo

Jan Müller 11 - 09 - 2012

Skálamaður letur dyr upp til norska oljuvinnu

Seinastu tvey árini hevur ein lítil fyritøka á Skála gjørt stóran mun. Hóast Hans Jákup Johannesen hevur verið nærum einsamallur at reka fyritøkuna, so hevur Faroe Offshore Service førleikament og leigað út hundraðtals føroyskar handverkarar til norsku oljuvinnuna. Og so mikið væl hevur gingist í hond, at Hans Jákup og hansara hjálparfólk herfyri kundu flyta inn í nýggj væla høli í Møttilsgili á Skála. Oljuvinnan og møguleikarnir hon letur upp fyri tykjast at hava fingið fastatøkur á Skálafjørðinum, har føroyska oljuhavnin hevur húsast seinastu 10 árini. Skipasmiðjan MEST hevur eisini fingið fótin fyri seg í hesi vinnu, har oljuútgerðarskip vanliga verða umvæld. Og eitt dótturfelag hjá MEST, Pam Offshore hevur verið virkið í oljuvinnuni í meira enn 10 ár. Enn ein nýggjur spíri í oljuvinnuni er so Faroe Offshore Service á Skála. Stórur áhugi tykist vera fyri hesi heldur óvanligu fyritøkuni millum bygdafólkið og onnur, sum hava áhuga fyri vinnuframburði. Tá móttøka var í nýggju hølunum stukku eini 70 fólk inn á gólvið at ynskja tillukku og góðan byr. Talan er um eini sjey ára gomul hús, sum eru broytt til ein nútímans skrivstovubygning við øllum hentleikum. Hans Jákup byrjaði einsamallur, men nú eru tey fýra á skrivstovuni. Fyritøkan varð sett á stovn í oktober 2010, og stovnarar vóru Hans Jákup Johannesen og Henning Hansen. Í dag leigar fyritøkan út nærum 100 elektrikarar, serstakliga til arbeiðsuppgávur í Norra. Sum skilst hava fyrispurningar verið eftir fólki úr Bretlandi og Asia eisini. Í fleiri ár arbeiddi Hans Jákup hjá Pam Offshore í Havn, ið hevur rættiliga stórt virksemi í Norra. Hans Jákup gjørdi seinni av at royna sjálvur og í dag húsast fyritøka hansara á Skála. Oljan.fo fer í komandi grein at tosa við Hans Jákup og tveir av elekrtikarunum, ið arbeiða í Norra og á boripalli á landgrunninum. Myndir - Hans Jákup og sonurin á oljumessuni í Stavanger her saman við kommunustýrislimum úr Runavík. Myndir frá móttøkuni